## EG MEINI TAÐ

# Kommersialisman sum farsótt



*Durita Holm skrivar:*

14. februar var ein hódagur, ein heilt vanligur hósdagur, helt eg. Men so var ikki. Frá morgninum av, tá eg kom oman á universitetið og allan dagin á tamb, var eg konfronterað við kommersialismuna íklædda tann mest sleiska búnan, eg kann hugsa mær. Kommersialisman var grýlukløдd sum kærleikin, men tað ringasta av øllum var, at fólk sóu ikki út til at varnast, at hetta bara var ein grýla, ein úlvur í seyðabúna - tey hildu seg veruliga síggja kærleikan.

Hvat er tað eg øsi meg soleiðis um? Jú, 14. februar var Valentines dagur. Vónandi eru tað nógv, sum ikki vita, hvat hetta sipar til, tí hetta er bara enn ein vánalig uppfinning úr USA - og sum ein farsótt hevur hon spjatt seg og er nú enntá komin til Noregs.

Valentines dag skal man vísa tí, man er góður við sín kærleika. Hetta skal ikki gerast við orðum ella gerningum. Tað skal ikki vera nakað platoniskt yvir tí. Nei, kærleikans prógv skal keypast. Hevði tað so av øllum illum veri tann útvalda ella útvaldi, ið fingu ágóðan, men so er ikki. Tær hundratals milliónirnar, ið vanlig fólk í dag lata seg lumpa at brúka í kærleikans heilaga navni, fara beint í teir grommu lummanar hjá keypssentrunum, sum her í Noregi hava brúkt ikki minni enn 200 milliónir krónur uppá sølulýsingar.

Summi verja slík tiltøk. Tey siga, at alt sum kann fremja kærleikan, er gott, og at tað er betri, at lýsingarpengar verða nýttir til kærleikans endamál enn so nógv annað. Tað er júst her, eg haldi, at tey fara skeiv. Fyri tað fyrsta eru lýsingarpengarnir ikki ætlaðir at fremja kærleikan, men bara sær sjálvum, kommersialismuni. Fyri tað næsta haldi eg, at eitt slíkt kærleikstekin sprottin úr lýsingum, er eitt heldur vánaligt og óektað tekin uppá kærleikan. Eg haldi faktisk, at eg hevði blivið hálvavegna fornermað um eg fekk eina gávu ella eitt valentineskort júst hendan dagin. Eg hevði hugsað, at tað í øllum førum ikki var ein spontan kensla av kærleika, sum lá aftan fyri, men meira at kalla ein skylda. Slíkan kærleika leggi eg einki í.

Kommersialisman er komin fyri at vera, men vit mugu ansa eftir, at hon ikki sleppur inn um allar skansar. Tað er ikki lætt, tí hon er ein ótamdur máttur í sær sjálvum, sum ikki skýggjar nakað sum heilagt. Vandin er, at hon spakuliga krípur inn í høvdini og hjørtuni á okkum, og at vit at enda ikki longur kunnu virka á nøkrum lívsøkjum uttan at hava hana við. Ringast er tað sjálvandi, tá hon er vorðin ein ótilvitaður partur av okkum. Tann dagin, tá vit ikki longur duga at vísa kærleikan uttan at hava eina slíka orsøk bæði sum legitimering og fyri ikki at tykjast til láturs.

Kanska er vandin ógrundaður, men okkum nýtist bara at hyggja eitt sindur gjølla at norðuramerikanarum, sjálvandi uttan at skera allar um ein kamb. Tað er lítil ivi um, at grunnskygni hinumegin Atlantshavið er ein realitetur. Har er "keyp og blaka burtur" sinnalagið vorðin ideologi og við sviðusoð verða hugleiðing og integritetur.

Eg kann ikki hugsa mær, at tað er tann vegin, vit ynskja at fara! "God bless Amerika".

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

## GAMLAR HAVNARMYNDIR

*Lagt til rættis: Birgar Johannessen*

# Havnargentur spæla fótbólt



*Hendan myndin er tikin í 60'unum. Tað eru gentur hjá B36 og HB, sum skulu leika dyst. Nógv kend nøvn eru á myndini, men nøkur nøvn vanta tó.*

*Er tað onkur, ið kennir genturnar á myndini, so skrivið til Sosialin, sigið okkum vinarliga, nær myndin er tikin og í hvørjum sambandi.*

*Myndaeigari: Guðbjørg Christiansen*

# Trævøkstur í Havn og Urtagarðsfelagið

Fyrst í 20. øld stovnaðu havnarmenn eitt felag, sum teir nevndu Urtagarðsfelagið. Tað er teimum monnum, ið hetta felag stovnaðu, fyri at takka, at miðbýurin í Havn einaferð var eitt reint paradís, hvat trøum viðvíkur.

Men útbygging skuldi til, og blivu so gott sum øll trøini burturbeind.

Tá ið man sær myndir frá hesi tíðini, kann ikki sigast annað enn, at tað var spell at ikki kundi arbeiðast øðrvísi frá býráðsins síðu.

Eitt nú trøini framman fyri standmyndina av Rasmusi Effersøe og trøini millum Sparikassan og Telefonverkið: Var tað nú neyðugt, at tey blivu burturbeind?

Eftirtíðin hevur víst okkum, at tað kundi verið arbeitt øðrvísi.







*Leikararnir í leikinum "Renn fyri vívinum"*

# Rein komedia

**Leikbólkurin Spírar er nú klárur við enn einum sjónleiki. Hesaferð er talan um reinan skemtileik — eina reina komediu, sum hóvar kræsnu áskoðarafjøldini. "Renn fyri vívinum" hevur seinastu mánaðirnar verið miðpunktið í sjónleikatilveruni hjá unga leikbólkinum**

SJÓNLEIKUR
*Heri á Rógvi*

Í hesum døgum er lív í Sjónleikarhúsinum í Havn. Tað eru Spírar, sum fylla húsið og hava fylt húsið teir tann seinasta mánaðin. Á skránni er sjónleikur. ÍÌ hesum førinum leikurin "Renn fyri vívinum" eftir enska rithøvundan Ray Cooney. Leikurin er upprunaliga á enskum og eitur Run for your wife. Leikurin er skrivaður í 1984, og hann er sera nógv spæIdur m.a. í Onglandi og í Danmark. Ray Cooney er sjónleikari, leikstjóri og rithøvundur, og talan er um ein ordiligan enskan skemtileik. Leikararnir eru átta í tali.

Í stuttum ber til at siga, at leikurin snýr seg um ein ógvuliga óhepnan hýruvognsførara, sum hevur tvær konur, og hann gerst fløktur ímillum tær, tá hann endar á sjúkrahúsinum. Hann verður kallaður fyri ein ósekur bigamistur av leikarunum.

### Byrjaðu tíðliga

Tað hevur tikið sína tíð at fáa alt alt upp á pláss, soleiðis at hurðarnar kunnu lætast upp, og áskoðararnir sleppa innum til fyrstu sýningina. Tað var væl áðrenn, tú kundi skriva 2002, at leikararnir so smátt byrjaðu at savnast. Tað var tíðliga í november seinasta ár, at sjálvar venjingarnar fóru í gongd, og tað tók ikki langa tíð, áðrenn tey leikandi dugdu handritið. Síðani er eisini Jákup Veyhe komin uppí sum leikstjóri, men hann skuldi líka gerast leysur úr Klakvík. Hesa seinasta tíðina hevur verið vant tað mesta av degnum. Øll segl eru sett til, og tá arbeiðsdagurin er liðugur streymar tað við áhugaðum fólki í Sjónleikarhúsinum.

Tað eru Spírar, sum seta leikin upp og spæla. Rætta navnið er áhugaleikbólkurin Spírar, men hetta heitið er ein farin tíð, verður sagt, tí nú eru tey bara Spírar. Talan er um bólk av leikarunum, har tey flestu kunnu bólkast undir at vera ung. Spírar pallsettu seinasta vár leikin Músafellan, ið víðagitna Agatha Christie hevur skrivað. Undirtøkan tá var eitt sindur misjøvn, men Spírar halda seg ikki aftur av hesari orsøk, og tey siga seg hava ein góðan lærdóm við sær til arbeiðið við hesum leikinum.

- Í seinasta leikinum komu vit eitt sindur illa frá byrjan, og arbeiðsuppgávurnar vórðu býttar út sum best bar til. Hesaferð hava vit skilt millum leikfólkið og hini, ið hjálpa á ymsan hátt, soleiðis at vit sum leikarar hava nóg mikið av rásarúmi til at leggja alla orku í leikin, sigur Hallur Hjalgrímsson, ið er ein av berandi kreftunum í Spírum.

Og hjálparum tykist tað eisini at vera nógvir av. Henda dagin vit vóru á gátt gekk hurðin rættiliga, og hjálparar eins og vinfólk stukku inn á gólvið. Tað skulu nógvar góðar kreftir til at frá eina tílíka sjónleikaverkætlan at hanga saman, og leikararnir eru eisini so hjartaliga takksamir fyri hjálpina, ið teir siga seg ikki kunnu hava verið fyri uttan.

Nógvu og longu dagarnir við eitt sindur og hvørjum, og nógva stríðið og trýstið við tíð og pengum, er ikki nakað, ið fær Spírararnar at setast aftur.

-Tað er hetta, ið Spírar eru, sigur Hallur Hjalgrímsson.

### Fobi

Sum áður nevnt hava Spírar fingið hendur á Jákup Veyhe til at vera leikstjóri. Hann leikstjórnaði eisini Músafelluna, og hann var so mikið væl dámdur, at hann varð spurdur aftur. Jákup Veyhe, sum telist millum tey meira kendu innanfyri leik og serliga skemt í Føroyum, hevur valt at leggja arbeiðið til rættis upp á gamla máta, sum hann tekur til.

-Tað fyrsta hjá leikarunum var at læra handritið uttanat. Síðani tóku vit tað harfrá. Leikritið er eisini so ótrúliga stuttligt, at vit flenna hvørja einastu ferð, ið vit lesa tað, sigur Jákup Veyhe.

Hann letur væl at umstøðunum, sum hann heldur hava givið rættan karmin fyri at venja og spæla sjónleik. Tað mesta av pallinum varð klárt í góðari tíð, og hetta hevur hjálpt nógv. Pallurin, ið verður nýttur, er ein av teimum kendu skrápallunum. Sjálv pallmyndin er rættiliga einføld, har tað eru tvey rúm í einum, so at siga.

Jákup Veyhe heldur, at tað hevur verið spennandi at leikstjórna "Renn fyri vívinum", og hann letur væl at leikarunum, sum hann kallar fyri royndar við tí rætta hugburðinum, og teir eru við uppá tað, sum hann tekur til.

Teir átta leikararnir hava eina strævna uppgávu í "Renn fyri vívinum", tí tað er nógv ferð á, og áskoðarin verður mestsum blástur aftur í stólin, ljóðar tað frá Jákupi.

- Eg haldi, tú skalt koma at hyggja at leikinum fyri moralin. Leikurin er øgiliga enskur við enskum humori, og hetta er ótrúliga stuttlig, har fleiri modernað tema eru við sum bøssafobi og annað gott. Leikurin er ein rein komedia, sigur Jákup Veyhe.

Jákup veit at siga, at skemtileikir eru vorðnir ein góð søluvøra í Føroyum, og hann hevur eisini góðar vónir um henda leikin.

"Renn fyri vívinum" verður frumframførdur í kvøld, leygarkvøldið, og verður spældur eina tíð fram.